

Gudny Langgaard við dóttrini, Emmu, á knøunum, Waid og pápi hansara, Dayarant
Mynd: Jan Müller

Talan var um Kristian á Lakjuni. Hann var vorðin so troyttur at greiða frá, hvar Føroyar lógu og hvat tað var fyri land, at hann fyri at lætta um vísti á Danmark.

Dayarant hittir sum nevnt abbadóttrina á fyrsta sinni, men tað er sjálvandi eisini galdandi fyri verfamiljuna hjá soninum. Og mouritianarin er ógvuliga fegin um nýggju familjuna hjá soninum.

Tey eru ógvuliga fitt fólk, tað er vist, sigur Dayarant.

Hann hevði sjálvandi sæð myndir av Føroyum, so hann visti á leið hvat hann kundi rokna við. Og tað stendur væl mát við tað, hann hevð hugsa sær. Føroyar eru ikki so ógvuliga ólíkar Mauritius – burtursæð frá veðrinum, sjálvandi.